# Vagnur aftur skaddur

Gøtumenn fara á vøllin eftir fjórða sigrinum á rað, tá HB kemur í Sarpisgerði sunnudagin. Talan verður sjálvandi ikki um lætta uppgávu, nú trífaldu meistaranir vitja, men sum heild tykjast gøtumenn vera væl fyri til uppgávuna. Ikki minst nú Krzystof Popczynski er tøkur aftur, eftir at hann hevði leikbann, tá GÍ vann í Klaksvík seinasta vikuskifti.

Hinvegin er Hans Pauli Samuelsen ikki tøkur. Hann hevur fingið liðbandsskaða í knæið, og ivasamt er, nær hann verður tøkur aftur. Sámal Joensen er nústaðni komin veruliga í holt við venjingina aftur, og so er spurningurin, hvussu hansara leiklutur verður. Ivaleyst sleppur hann at byrja á beinkinum, men hinvegin er tað heldur ikki ringasti jokarin, sum ein venjari kann hava.



Hjá HB er í øllum førum vist, at Vagnur Mohr Mortensen ikki er tøkur. Hann var annars júst við at koma veruliga fyri seg eftir skaða í rygginum, men nú er so ein nýggjur skaði, sum argar. Hesaferð er tað fótinum, sum tað er galið við, og tí verður hann ikki tøkur.

Í aðrar mátar verður tó roknað við, at flestu menninir eru tøkir. Bárður Mortansson hevur ligið sjúkur í vikuni, men roknað varð tó við, at hann verður tøkur.

-jm

# Nú skal Dragan royna seg



Fuglfirðingar hava higartil í ár havt góðar royndir av suðuroyarferðum. Tvær ferðir hava teir verið í Vági, og nú er so ætlanin at triði sigurin á Eiðinum skal fáast til høldar.

Tað hava tey í VB tó ongar ætlanir um.

- Teir hava argað okkum við at vinna tvær ferðir á rað. Og sigrarnir hava eisini verið teprir, so tað er ikki ógjørligt at broyta. Og hartil, so skulu vit altso hava trý stig, um vit skulu vinna okkum úr botninum, sigur Mortan í Hørg hjá VB.

Hetta verður annars fyrsta ferðin, at Dragan Kovacevic skal standa á odda fyri VB í landskappingardyst, síðani hann varð settur í leysa venjarastólin, og so er spurningurin, hvørt tað kann geva VB neyðuga skumpið rætta vegin.

Hjá ÍF tykist barometrið at venda rætta vegin, eftir at teir loksins hildu málið reint í seinasta heimadystinum. Tað verður eisini setningurin hesaferð, og so vóna teir, at tað skal bera til at vinna enn ein tepran sigur.

Fritleif í Lambanum verður tó neyvan við í hesum royndum, eftir at hann fekk skaða í dysti fyri triðjudeildarliðið hjá ÍF seinasta vikuskifti. Og heldur ikki John Thomsen er enn komin fyri seg.

-jm

## NSÍ fer eftir næsta steypinum

Annað vikuskiftið á rað skal NSÍ spæla steypadyst. Hesaferð á Eiði, har tey eisini vilja upp í part á sundalagsstevnuni.

Hjá NSÍ fekk Sjúrður Jacobsen skaða undir venjing í vikuni, og hann verður tí ikki partur av hópinum. Tað rokna tey við, at Jústinus R. Hansen verður. Tá vit seinast høvdu samband við NSÍ, vistu tey í øllum førum ikki at siga, um FSF hevði viðgjørt leikbann hansara, og tí varð roknað við, at hetta bara fevndi um tann eina dystardagin, sum hann longur hevur sitið yvir.

Eisini verður roknað við, at Kári Hansen er í hópinum, eftir at hann annars hevur verið úti við skaða størsta partin av árinum.

Hjá EB/Streymi verður sagt, at allir mans eru tøkir. Hans Pauli Samuelsen og Knút Vesturtún eru av álvara farnir at nærkast fimta gula kortinum, men enn eru leikbannini ikki farin at gera um seg í so máta.

Aftur hesa ferð verður tað leigusveinurin úr B36, Magnus E. Poulsen, sum fer at verja málið hjá EB/Streymi.

-jm

# Allan framvegis áleypari

B36 ætlar sær eftir øllum stigunum, tá TB kemur á vitjan í Gundadali.

Undan dystinum, sum skuldi vera í Vági seinasta vikuskifti, var greitt, at árstalsfelagið nú hevði øll pappírsviðurskifti hjá brasilianska Wellington í rættlag. Tað merkir, at felagið nú er styrkt á álopsfrontinum, har Allan Mørkøre hevur verið góður vikarur. Somikið góður, at venjarin hjá liðnum ongar ætlanir hevur um at flyta hann.

- Allan hevur gjørt tað gott í álopinum, og at Wellington nú er tøkur, merkir bara, at vit hava tríggjar góðar áleyparar. Og eg havi so ongar ætlanir um at flyta toppskjúttan aftur á vøllin, sigur Sigfríður Clementsen.

Hann sigur annars, at tey í B36 hava allar mans tøkar til uppgávuna sunnudagin.

Og tað siga tvøramenn seg eisini hava. Einasta undantakið er Daniel Nyarko, sum hevur verið skaddur í eina tíð, men á aðrar mátar tykjast hvørki leikbann ella skaðar at hótta hópin.

-jm



## Steypadystur á Eiði

Í samband við stevnuna í Hósvík, eru teir báðir lands-kappingardystirnir hjá besta kvinnu- og mansliðnum hjá EB/Streymi samstundis steypadystir.

Báðir dystirnir eru tí eisini fluttir til leygardag, og spæla kvinnurnar móti FS Vágum kl. 15.00, meðan menninir hjá EB/Streymi fara a ttakast við NSÍ kl. 18.

-jm

# Framvegis striltið hjá KR

**Málleysi javnleikurin í Grindavík ber við sær, at frástøðan til toppin øktist uppaftur meiri hjá KR og Rógva Jacobsen, sum hesa ferð var miðframherji**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Mikukvøldið og hóskvøldið vóru dystirnir í sætta umfarinum í bestu íslendsku deildini spældir. KR var hóskvøldið í Grindavík, og úrslitið var málleysur javnleikur.

KR spældi undan vindinum í 1. hálvleiki. Tá høvdu teir fleiri møguleikar, men tað eydnaðist ikki at fáa mál. Rógvi Jacobsen var allar 90 minuttirnar á vøllinum. Hann var miðframherji, og sambært heimasíðuna hjá felagnum fekk hann besta møguleikan í 1. hálvleiki. Rógvi royndi at temja og koma í eitt sindur betri støðu, og so varð hann takláður.

KR er niðanfyri miðjuna, men heimasíðan heldur, at avríkið hesa ferð var betri, enn tað var, tá ið teir taptu í Oyggjunum. Vónað verður, at dysturin í Grindavík var fyrsta stigið burtur úr lítið hugaligu gongdini, sum hevur verið hjá KR í fyrsta triðinginum av kappingini.

FH av Hafnafirði er framvegis oddaliðið við fullum stigatali. Hesa ferð vóru teir í høvuðsstaðnum og spældu ímóti Vali, og FH vann 1-0. Talan var um toppuppgerð, tí undan sætta umfarinum vóru tað bara hesi bæði feløgini, sum høvdu fingið fulla úrtøku. Nú er FH trý stig frammanfyri Val, og frá høvuðsstaðarfelagnum og aftur til eitt annað felag úr Reykjavík, Fylkir, og Keflavík eru tað fimm stig.

Fylkir og Fram vóru í grannauppgerð í Reykjavík, og úrslitið var 1-1 Þróttur hølvaði botnliðið ÍBV av 4-0. Hjá ÍA gongur striltið. Á heimavøllinum í Akranesi taptu teir hesa ferð 2-1 ímóti Keflavík. ÍA og KR hava sjey stig.